

FORD FOCUS 1.6 GHIA

**Skrásetingarnr:** UV 794 **Km:** 127.000
**Árgangur:** 01.01.2000

**kr. 68.000,-**



CITROEN JUMPER 2.5

**Skrásetingarnr:** KV 825 **Km:** 139.000
**Árgangur:** 08.02.2001

**kr. 78.000,-**



TOYOTA YARIS 1.3 LUNA

**Skrásetingarnr:** PL 937 **Km:** 139.700
**Árgangur:** 12.01.2000

**kr. 75.000,-**



TOYOTA YARIS 1.3 SOL — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** EP 331 **Km:** 10.900
**Árgangur:** 03.11.2006

**kr. 172.000,-**



TOYOTA AVENSIS 2.4 AUT. SOL — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KP 008 **Km:** 19.000
**Árgangur:** 14.06.2006

**kr. 284.000,-**



HONDA ACCORD 2.0

**Skrásetingarnr:** NS 436 **Km:** 173.000
**Árgangur:** 15.06.1999

**kr. 78.000,-**



PEUGEOT 206 1.4 BENSIN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TE 795 **Km:** 28.000
**Árgangur:** 31.05.2006

**kr. 145.000,-**



TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KR 980 **Km:** 37.000
**Árgangur:** 17.07.2002

**kr. 120.000,-**



TOYOTA YARIS 1.0 H/B TERRA — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TL 180 **Km:** 38.500
**Árgangur:** 09.08.2004

**kr. 112.000,-**



TOYOTA AVENSIS 1.8 AUT. SOL STC. — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PK 326 **Km:** 30.269
**Árgangur:** 13.03.2006

**kr. 248.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F




*Vøllurin í Nólsoy er mest sum allur undir í runu og gróti. Sjógvurin er tó farin av honum nú*

*Mynd: Nicolaj Falck*

# Vøllurin undir í runu

**Nógva brimið fríggjakvøldið hevði við sær, at fótbóltsvøllurin í Nólsoy er undir í runu og gróti. Tað skal stórarbeiði til at rudda hann aftur**

BRIM

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Veðrið var einki serligt fríggjadagin. Tað máttu suðuroyingar sanna, tá Smyril avlýsti túrin norður aftur seinnapartin. Og í Nólsoy var brimið so nógv, at sjógvurin skolaði tvørtur um byrgingarnar eystantil og førdi runu og grót við sær.

Tað eru eini fýra ár síðani, at hendan byrgingin var bygd, júst við tí fyri eyga at verja fyri fótbóltsvøllinum, og higartil hevur byrgingin virka eftir vild. Men so nógv var brimið fríggjakvøldið, at tað floymdi upp um byrgingina.

Sum myndirnar vísa er mest sum allur vøllurin undir í runu og gróti, og tað verður ikki bara sum at siga tað at rudda alt aftur.

Sum skilst er vøllurin tó ikki loysnaður, men í støðum liggur runan tíggju sentimetrar tjúkk. Menn frá Tórshavnar kommunu skuldu í dag fara at vita, um teir fáa rudda vøllin aftur, men tað sigur seg sjálvt, at trupult verður at fáa alla rununa upp, tí hon er eyðvitað sokkin niður í kunstgrasið.

Eisini kirkjugarðurin hevur merkt ringa brimið. Har er komin ein riva í garðin, so tað er týðiligt, at nógv hevur staðið á.



*Tað var nógv brim í Nólsoy fríggjadagin. Her brýtur upp um grótverjuna, sum skuldi forða fyri, at sjógvur skolaði inn yvir fótbóltsvøllin*

*Mynd: Eirikur S. Hansen*